Lesarabræv

# Aftursvar til Ólavur Petersen

Fríggjadagin tann 30. juni í ár, var ein grein í Dimmalætting til Arnbjørn R. Thomsen undir teiginum Meining.

Yvirskriftin var so andstyggilig, at hana seti eg ikki upp á prent.

Tað er so nógv hent síðan tá.

Arnbjørn er ikki longur á lívi, og nú vit eru komin eitt sindur frá tí skelki og sorg, loyvi eg mær sum leiðari á Blákrossheiminum at gera nakrar viðmerkingar.

Við tað at Blákrossheimið varð álopið av grovari útspillan undir dulnavni »keldan« í Oyggjatíðindi (eitt lítið petti í Dimmu, sum váttar tað sum stendur í Oyggjatíðindi eisini undir dulnavni) og til seinast tann hóttan um at klaga var send Landsstýrið, varð ovboðið hjá Arnbirni.

Arnbjørn var, sum vit onnur sum arbeiða har, sera harmur um viðferðina Blákrossheimið hevur fingið.

Hann var vitandi um gongdina á Blákrossheiminum, tí leggur hann sjálvur rygg til fyri at reinsa útspillanina av Blákrossheiminum, og tað sigur hann sjálvur í sínum skrivi, at hann tekur fulla ábyrgd av.

Sum tað sæst í skrivinum frá Ólavi, so er hann eisini væl vitandi um gongdina á Blákrossheiminum. Tú veist, nær brævið er skrivað og sent, og hvat hevur staðið í tí. Og um tú ikki sært, hvør ið hevur spískað blýantin hjá viðkomandi, so sigur tað meiri um teg enn um tann, ið skrivað hevur klaguna.

Tú sigur millum annað at nógv vita hvønn Arnbjørn sipar til, tá ið hann skrivaði grein sína 23. juni, men tú gloymir, at tín útgreinan av viðkomandi persóni er so tíðulig, at nú ivast eingin, hvør ið tað er.

At brot á tagnarskylduna er álvarsamt, tað taki eg fult undir við, og tað eigur at fáa fylgir.

Eg skrivi hetta mest fyri at afturvísa tína ótrúliga ljótu yvirskrift um Arnbjørn. Og meini persónliga at innihaldið í greinini hjá tær Ólavur er vamlisligt og heilt burturvið.

Tíbetur so hevur Føroya fólk fingið sannleikan um Arnbjørn við teimum nógvu góðu minningarorðum frá ymiskum fólkum.

*Heilsan*
**Sólborg Dulavík**

# Ein tøkk til Tórbjørn

Tá eg hugdi í bløðini leygardagin 12. august, sá eg, at borgarstjórin í Klaksvík takkar Tórbirni Jacobsen fyri at hann hevur flutt heilsurøktarskúlan úr Havnini og suður til Tvøroyrar.

Tað er sjálvandi gleðiligt og fjálgt at síggja eina slíka positiva heilsan.

Samstundis virkaði hetta eitt sindur øvugt, at tað er borgarstjórin í Klaksvík sum takkar. Er tað virkuliga so gali, at eingin suðringur hevur sett eina grein saman og takka fyri tað sama??

Eftir at hava hugsa meg eitt sindur um, kom mær til hugs, at tað hóast alt var ein, sum hevði havt eina grein við tøkk til Tórbjørn, og tað var býráðslimurin á Tvøroyri, Finnleif Durhuus, og tøkk fái hann fyri tað, tí hann er helst tann einasti. Vónandi geri eg ongum órætt.

Á jú, nú minnist eg. Ein heilsan kom eisini úr Lopra. Hesa heilsan, ella lat meg kalla hana eitt spark, vildu vit øll hampafólk her suðuri veri fyri uttan. Tann sum fær seg at festa slíkt ótespiligt á blað, má heilt avgjørt líða av tí tey kalla fyri Kroytzfeldt- JÁKUP-sjúkuni.

Tær grunnu, fyri ikki at siga tápuligu arfinningarnar sum ávísar fakfelagsforkvinnur høvdu í bløðunum í síðstu viku, eru ikki verdar at gera viðmerkingar til. Tað undrar meg bara, at tær ella í hvussu so er tann eina av teimum, nú er vorðin so góð við hendan skúlan??!!

Eg vil hervið takka tær Tórbjørn, fyri at tú tók hetta stig, sum er í samsvari við samgonguskjalið, um at menna útjaðaran. Sambært býráðsformanninum á Tvøroyri er skúlin vælkomin har. Og eftir hvat eg veit er húsarúmd bæði fyri skúla, næmingum og plássum til starvsvenjing.

*Vinarligast*
**Kai Vágfjall**

# Hvør stýrir í veruleikanum andstøðuni í Føroyum

Vilja Jóannes Eidesgaard og Edmund Johannesen veruliga við sínum ræðumyndum um at Føroyar ikki kunnu, ella eru førar fyri, at vera eitt sjálvstøðugt land og fólk juridiskt, javnsett við Danmark og tess fólk í ríkinum, sum er meiningin við fullveldisavtaluni, og so saman við Poul Nyrup Rasmussen, sum nokk hevur aðrar hensiktir at hugsa um, enn teir báðir fyrst nevndu, men stuðulin er óavmarkaður, hvat so er og ikki, frá Sambandsflokkinum og Javnaðarflokkinum.

At noyða føroyingar at atkvøða ímóti sínum yvirbevísningi og tvinga føroyingar at verða verandi undir Danmark og tess yvirvaldi við at hótta við at taka blokkstuðulin burtur eftir 4 árum, og alt tað sum hini norðurlond eru samd um við sínámillum avtalum, bæði í skúla- og sjúkrahúsmálum v.m. Hetta við skúla- og sjúkrahúsmálunum v.m. hoyrir man bert frá Sambandsflokkinum og Javnaðarflokkinum, »tí tað er tað Jóannes Eidesgaard og Edmund Joensen fortelja føroyingum í Føroyum, men ikki eitt orð frá dønum um tað í Danmark«. Hesir menn kunnu ikki hava høgar tankar um føroyingar, og teirra evnir í forhold til onnur fólk, sjálvt um teir eru valdir politikarar í Føroyum, »hvør hevur bygt hetta land, danir«?

Kann ein lygn veruliga fáa so sterkt fótafesti í einum parti av fólkinum, at tá ið sannleikin verður sagdur verða øll djevulsk kneb brúkt til at oyða tann, sum sigur sannleikan, sannleikan um at Føroyar og Føroya fólk bert eru eitt tillegg til tað ektaða Danmark. Jú, danski Javnaðarflokkurin og Vinstra stýra sínum undirsáttum í Føroyum væl.

Hatta við blokkstuðlinum er løgið, tá ið Danmark hevur rópt um frælsið fyri tey nýggju londini í fyrrverandi Sovjet og fyrrverandi Jugoslavia, og samstundis givið milliardir til hesi lond eftir at tey hava fingið frælsi, tá ið føroyska landsstýrið sigur eftir max. 15 ár skal Danmark ikki gjalda meira til Føroyar, »Føroyar eru enn ein partur av ríkinum, um fullveldisavtalan verður sett í verk, men sum líka partur«.

Men um føroyingar halda fram sum nú, ella bert við sjálvstýri, so skal Danmark jú gjalda, siga Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin, tað sama sum nú, og kanska meira um Sambandsflokkurin fær makt aftur, »tí hjá teimum eitur einki identitetur og sjálvbjargni, bert nýta og einki ýta, men danir siga nakað annað«.

Fleiri og fleiri danskir politikarar siga við hørðum orðum, at tað er ikki rætt fyri tann danska skattgjaldaran, at gjalda eitt yvirforbrúk í Føroyum, og at føroyingar gjalda minni í skatti enn danir, teir siga, at um føroyingar skulu verða verandi í ríkinum, (um tað verður við heimastýrislógini ella sjálvstýrislóg), so skal skattaprosentið upp á danskt niveau, so at blokkurin skal vekk í hvussu er, sjálvt um føroyingar bert velja sjálvstýri. Tí 77% av dønum vilja at blokkurin skal burtur, og so er ongin ivi um, hvat donsku politikararnir gera, tí danir eiga jú blokkin, og politikararnir skulu eisini veljast inn aftur á fólkating, »tá slaktar man gjarna kúnna, um hon so eitur Føroyar ella føroyingur, tí tað hava vit sæð fyrr«.

Ikki skal eg siga nakað ringt um tann vanliga danan, uttan fyri tað politiska, men hann veit meira um og interesserar seg meira fyri peruindiánaranum enn fyri føroyingum.

Tá ið man lesur í donsku bløðunum og sær í sjónvarpinum um tey flottu hús, sum tey byggja í Føroyum, og teir flottu bilar, sum har koyra, sum danir siga seg vera við til at gjalda, men hvat skal tann almindiligi danin halda, hann hevur bert bløðini og sjónvarpið at skapa sær kunnleika um Føroyar, og tá ið so meira enn helvtin av danska blokkstuðlinum til Føroyar, sum føroyingar ikki hava brúk fyri, verður fluttur úr Føroyum aftur í útlendskar bankar at renta, so hava teir fingið nokk, og pluss ta snúltaramynd, sambandsflokkarnir geva her í Danmark av føroyingum í Føroyum, at teir ikki kunnu ella eru førir fyri nakað uttan Danmark.

Sum sagt eru uml. 77% av dønum fyri at taka blokkin av, og tað kann ikki vera nakar ivi um, hví teir halda tað, tá Føroyar eru millum 7. til 10. ríkastu lond í heiminum nú, og bert brúka ein minni part av blokkstuðlinum og hava eitt yvirskot, sum er langt størri enn tað danska.

Sum danski fíggjarministarin Mogens Lykketoft einaferð segði, »tað finst neyvan nakar økonomur við síni fullu fimm, sum ikki kennir søguna um Jósef frá gamla testamenti um tey 7 góðu árini og tey 7 ringu árini. Høvdu allir føroyskir politikarar havt hesa hugsan sum sín grundtanka, hann fáa teir bert við at taka ábyrgdina av landinum, og ikki sum nú, »kanska, nei, vit tora ikki álíkavæl«. Men sum var og sum nokk verður aftur, um okkara politiska støða í Føroyum ikki verður broytt alvorliga í forhold til Dnamark, so koma andstøðuflokkarnir (Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin) til at koyra í sama spori sum fyrr og sum nú, uttan at hava ábyrgdina av sær sjálvum, við einum sórum minni um 80'ini og tí oyðsli, sum har fór fram, »onga ábyrgd tak«, tað er danskt í síðsta enda, ja, tað er tað teir gera, fyri at tryggja Danmark yvirvaldið yvir Føroyum og at ómynduggera føroyingar totalt, sum sambandsflokkarnir hava klárað so væl higartil.

Merkiligt at hesir báðir flokkar ikki hava kunnað arbeitt meira saman enn teir hava higartil »í einum landsstýri« tá teir nú eru so einigir um alt tá tað snýr seg um danskt yvirvald yvir Føroyum, ella man tað vera sum nógv bendir á, at boðini frá Poul Nyrup og Anders Fogh eru »at teir skulu vera einigir«.

Latið ræðumyndina tilhoyra teimum, sum skapa hana. Teir skapa eina ræðumynd av øvund, tí teir ikki eru førir fyri at standa fyri at skapa frælsi, teir eru ikki førir fyri at ganga í hansara skugga, »frælsisins skugga«.

Frælsi er ikki bert ein dreymur fyri politikarar, men fyri fólkið, sum skuldi átt landið, har tey búgva, og ikki teir, sum siga »tað er okkara ábyrgd, við okkara góðgerðum, at tey hava tað so gott, har í Føroyum«.

Latið dreymin og veruleikan blíva eitt, ein vón um ein nýggjan start, fyri fólk og land, »fyri føroyingar og Føroyar«. At skapa frælsi skulu menn og kvinnur, sum trúgva uppá tað, at vinna sær sjálvum ein identitet.

Latið ikki trælabandið verða tað sterka bandið, ikki sterkari enn tjóðskapur og trúgv.

12. august 2000
**Dánial Jákup Jakobsen**
**Daddellunden 12, 3t.h.**
**Esbjerg**

# Skeiðsdepilin byrjar annað starvsárið

Skeiðsdepilin á Langasandi byrjar annað starvsárið um tvær vikur. Góða umdømið frá seinastu vetrarhálvu hevur við sær, at fleiri skeiðsrøðir eru um fullteknaðar. Enn ber tó til at tekna seg, bæði bólkar og einstaklingar.

Tað er ikki einans enskt, fólk kunnu læra seg á Skeiðsdeplinum, hóast flestu luttakarar seinasta starvsár tóku lut í júst skeiðum, sum endaðu við altjóðaligu Cambrigde-próvtøkunum í enskum á ymiskum stigum.

Tí eisini ber til at taka skeið í føroyskum á sama hátt, tað er at siga 6 ferðir 2-3 dagar í tíðarskeiðnum september 2000 til mars-apríl 2001. Røðirnar verða hildnar í vikuskiftum, fríggjakvøld til sunnudag, ella miðvikur, týskvøld til hósdag. - Øll fáa próvbræv, tá ið lokið er.

### Skeiðsrøðir

Næsta mánað byrja sostatt hesi vikuskiftisskeið: »Enskt byrjanarskeið«, »Enskt lágstig«, »Enskt framhaldsskeið«, »Føroyskt fyri øll« og »Faroese for non-Nordic Speakers«. - Eisini verður røð, skipað í modul, sum eitur »Hvussu menna vit smávirki og -fyritøkur á bestan hátt?«, ætlað handils- og vinnulívsfólki, serliga teimum, sum royna at víðka, økja og menna virkið ella fyritøkuna; ætlað øllum á slínum fyritøkur, t.e. 8–10 fólkum.

Miðvikurøðirnar fevna um »Enskt hástig«, »Enskt í Altjóða Samskifti og Handli og Umsiting«, »Altjóðaligt læraraskeið í enskum« og »Enskt í ferðavinnuni« - Skeiðini eru øll vistarskeið.

Umframt hetta leggur nývalda leiðslan á Skeiðsdeplinum, vald á ársaðalfundi týskvøldið, dent á samstarv og samskifti við virki, stovnar, fyritøkur og einstaklingar. Og tikið verður fegin við uppskotum og ynskjum um onnur, serstøk skeið, sum gjørt var í seinasta starvsári. Luttararar á øllum skeiðum eru 8–12. Goldið verður fyri 8, eru færri.

### Nýgerðir - samstarv

Frá hesum starvsári fer depilin undir fjarlestur um teldu. Millum tey einstøku skeiðini í røðunum stendur luttakarum í boði at senda inn avrik til rættingar og viðmerkingar, eins og fáa ávísa frálæru tann vegin.

Saman við KT 2000 verður arbeitt við at útbyggja skipanir, so fólk kunnu taka ymiskar lærugreinir, seinni heilar útbúgvingar, sum fjarlestur, t.e. um teldu. Hetta, ið á enskum eitur »Distance Learning«.

Somuleiðis fer fram samstarv við Atlantic Airways um at veita luttakarum á ensktskeiðum okkara møguleikan at taka part, ella nakrar fáar dagar, av skeiðinum í Aberdeen.

Á hesar hættir roynir Skeiðsdepilin alsamt at menna, víðka um og bøta tilboð síni. - Heimasíðan er: www.depilin.fo



DAGFØR
TEG
HALT
SOSIALIN

Tekna teg sum haldara, so fært tú sosialin 5 ferðir um vikuna til dyrnar

Tíðindablaðið
sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

ÓKEYPIS
Sosialurin rindar postgjaldið
64

Undirritaði teknar seg sum haldara av Tíðindablaðnum Sosialinum, og fái blaðið *5 ferðir um vikuna.*

Navn:
Búst.:
Postnr., bygd, býur:
Tlf.:
Undirskrift:

☐ Haldarar í Føroyum: 360,-/ársfj.
☐ Haldarar í Europa: 510,-/ársfj.
☐ 5 bløð einaferð um vikuna í Europa: 425,-/ársfj.
☐ Onnur lond: Ymiskir prísir
☐ Internet: 240,-/ársfj.

Í býin - altíð eitt stað at fara

Streymoy

Kaggin
Fríggja-og leygarkvøldið spælir ARIA
DJ er MAGGI
Opið er frá kl. 17.00 við 5'ara
www.kaggin.fo
Sosialurin - 311820

AUTO
- Dag sum nátt -
- skjótt og gott -
Skalt tú bil hýra
- so er tað 311234
AUTO
BENZIN
DIESEL
KIOSK
- ALTDØGNIÐ -
AUTO 311234

fk Matseðilin
Hósdagin 17. august: Kalkunschnitzel
Fríggjadagin 18. august: Nakkasteik
Leygardagin 19. august: Enskan búff
Mánadagin 21. august: Gjørd hara
Týsdagin 22. august: Revelsbein
Mikudagin 23. august: Millíónbúff
Kostnaður 32,- kr.
***
Seinnaparts-TILBOÐ
frá kl. 14.00:
Juniorburgari 14,95
Maxiburgari *ella* Búffsandwich 19,95
Matstovan í Hoyvík

NÁTT-BUSSURIN
hjá Øssuri Christiansen
Leygarkvøldið:
• Úr Vestmanna kl. 24
• Úr Tórshavn kl. 01
• Úr Vestmanna kl. 04
• Úr Tórshavn kl. 05
(Koyrt verður um Kvívík og Kollafjørð, tá fráboðan fyriliggur)
Onnur kvøld kann koyrast eftir avtalu



Tlf. 424254
Bussarnir:
Tlf. 287752 • 286254

Lesið sosialin sosialin sosialin -tað loysir seg

Norðoyggjar

Klaksvíkar Klubbi
Dansur við "plátuvendara" verður leygarkvøldið 19. august
Klubbin hevur: POOLBORÐ BILLARDBORÐ ENSKAN FÓTBÓLT Á SKY

Eysturoy

EYDNAN á Oyrarbakka
Dansur verður leygarkvøldið 19/8
X-RAYS spæla
EYDNAN

sosialurin
www.sosialurin.fo

Vilja tygum vi› í
Í b‡in - hvønn hósdag
Ynskja tygum at l‡sa í teiginum *í b‡in*, so fylli› út henda lepan og sendi› hann til **Sosialin, box 76, 110 Tórshavn** – ella fax 314720

Tekstur